# Albin Petersen 80 ár



Fríggjadagin 11. august fyllir Albin Petersen í Vestmanna, vanliga nevndur Albin hjá Gundu, 80 ár. Albin er sonur Hans Jacob og Gundu Petersen, og er hann nr. seks av nýggju systkjum. Nú eru bert fýra eftir á lívi, og av teimum er Albin elstur. Pápin og elsti beiggin gingu burtur, tá Albin var bert sjey ára gamal.

Hann giftist í 1953 við Klaru Gaardbo av Nesi, og búsettust tey í Vestmanna. Tey fingu eina dóttir, hon er gift, og eiga tey tríggjar synir, sum abbin er sera stoltur av.

Sum ungur var Albin eitt skifti til skips, og var síðani við til at byggja SEV byrgingarnar í Vestmanna, áðrenn hann fór at arbeiða hjá Vestmanna Timburhandli, har hann arbeiddi í næstan 30 ár.

Hann hevur verið sera trúgvur í missiónshúsinum, har hann m.a. sat í stýrinum fyri húsið í mong ár, og hevur havt sunnudagsskúla til fyri fáum árum síðani. Eisini plagar hann at hava andakt í Eldrasambýlinum í Vestmanna av ogá. Eitt skifti sat hann í kirkjuráðnum, og tað munnu vera fáir sunnudagar, har hann ikki hevur sitið á sínum fasta plássi í kirkjuni.

Albin er blíður og fyrikomandi og dámar væl at práta við fólk hann hittir. Hann gongur dagliga ein túr oman á kaiina, og fylgir væl við hvussu tað gongur hjá skipunum, og fær hann mangan eitt gott prát við manningarnar. Eisini dámar honum væl at fara inn á gólvið at vitja nøkur av teimum, sum ikki orka so væl at koma út longur.

Hann hevur havt eitt friðarligt og gott lív, sum hann nú kann hyggja aftur á við gleði og takksemi.

Albin er burturstaddur føðingardagin.

Góði pápi, verpápi og abbi, vit vilja við hesum ynskja tær hjartaliga tillukku við teimum 80 árunum og takka tykkum fyri tað, tit hava verið fyri okkum. Vit gleða okkum til at halda dagin saman við tykkum.

**Vit í Kollafirði**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Olaf Johan Olsen** á Lava, andaðist mikudagin 9. august, 95 ára gamal. Kistan fer av ellisheiminum í morgin fríggjadagin kl. 17.00. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Andrias Jensen**, Sørvágur, vanliga nevndur Andrias á Túvala, ættaður úr Mykinsesi, andaðist í heiminum hósdagin 10. august, 88 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Ebba Klein**, Havn, ættað av Argjum, andaðist í heiminum mikudagin 9. august, 81 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

## Dagurin í morgin

**11. august. Hermann.** Einki kent halgimansnavn, men er komið í álmanakkan ístaðin fyri Tiburtius, sum summármáladagur – 14. apríl – eisini eitur.

Týskt navn, *hermaður*.

EFTIRLÝSING:

# Árgangur '56 úr Kommunuskúlanum



**Nógv fólk hava longu teknað seg til stóru 50 ára veitsluna, sum verður í Sjónleikarhúsinum. Men enn vanta nøkur teirra, sum hoyra til árgang 1956. Millum annað tey, sum komu í Kommunuskúlan seinni, eitt nú av bygd ella úr øðrum skúlum.**

**FÓLKALÍV**
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tórshavnar Kommunuskúli verður 50 ár í ár, og í tí sambandinum hevur ein bólkur av fyrrverandi næmingum, sum byrjaði í 1. flokki í 1956, tikið stig til eina rimmar nostalgiveitslu fyri árgangi '56 í Sjónleikarhúsinum leygardagin 26. august.

Nógv hava longu teknað seg, men sagt verður, at tey sakna nøkur av teimum mongu, sum gjørdust partur av árganginum sidenhen, eitt nú úr Nonnuskúlanum, av Argjum ella av Hvítanesi. Summi komu í flokkin í yngri árunum, meðan onnur ikki komu fyrr enn farið varð í real.

– Men kortini eru tey so avgjørt partur av árganginum, og vit heita inniliga á tey um at tekna seg, siga fyrireikararnir av tiltakinum.

Tiltakið byrjar leygardagin 26. august kl. 17.00 við "morgunsangi" í auluni í Kommunuskúlanum. Hagani gongur leiðin yvir í Sjónleikarhúsið, har Oddvør Skarðhamar borðreiðir við trimum rættum, umframt morgunmati. Orkestrið Anno '56 spælir upp til dans, og eru limirnir í hesum nýstovnaða orkestri, sum hevur vant hvønn sunnudag í seinastuni, teir navnframu: Frants Marius Olsen, Heri Krakesteen, Heri Nolsøe, Steingrím Abrahamsen, Óli Petersen, Hans Christian Clementsen og Harald Kjeld.

Fyrireikararnir heita harumframt á fólk um at finna fram lutir og myndir frá skúlatíðini, og at leggja tað inn til Kirstin í Wrangler Shop á Niels Finsensgøtu, tí ætlanin er at skipa fyri einari framsýning í forhøllini í Sjónleikarhúsinum.

Tekning fer fram á tann hátt, at fólk rinda 450,- kr. inn á konto 9181 – 152.263.0 í Føroya Sparikassa í seinasta lagi 19. august. Viðmerkið "anno '56".

Samband fæst við fyrireikararnar Jórunn Dánialsdóttir á 31.6024 / 22.6024 ella Kirstin á 31.4710.

# Maja og Sigvald í Morskranesi

*Nú er tómligt í Nesinum*
*Tit eru farin*
*Tit, sum fyrst løgdu okkara kós*
*Og eg sakni so sárliga*
*Tykkara røddir*
*Blíðu eygnabrá, brosini ljós*

*Her var mamma ein miðdepil*
*Bankandi hjarta*
*Lívgaði um okkum øll*
*Hon var bjartskygd sum fáur*
*Sá tað góða í øllum*
*Hennar trúgv flutti lættliga fjøll*

*Her var pápi hin frælslynti*
*Gløggur og speiskur*
*Onki av fótum hann tók*
*Til eitt prát altíð fúsur*
*Fylgdi gjølla við øllum*
*Leikti talv, spældi kort, las í bók*

*Tit ei fordómar høvdu*
*Onki trongskygni ráddi*
*Tí var hiti og trivnaður her*
*Her var rúm fyri øllum*
*Her var høgt undir lofti*
*Mær eitt friðskjól var tykkara verð*

*Og tit gleddust um lívið*
*Áttu løturnar ríkar*
*Tóku dagarnar bert ein í senn*
*So um vit kunnu liva*
*Eftir tykkara leisti*
*Ja, so liva tit við okkum enn*

Inger